# Várkapping í Runavík

**Leygardagin skipaði Roysnið fyri tí árligu Várkappingini í renning í Runavík**

RENNING
*tíðindaskriv*

20 luttakarar runnu tann 10 km langa teinin. Fleiri av teimum settu persónlig met.

Hjá monnunum gjørdist Jonhard Larsen úr Treystinum fremstur við tíðini 34,36 min. Nummar tvey gjørdist Sigurð B. Justinussen við 35,14 min. Sam Vang gjørdist nummar trý við 36,34 min. Teir renna báðir fyri Bragdið.

Veteranbólkin vann Jósvein Herup Olsen við 37,40 min. Nummar tvey gjørdist Óli Olsen við 39,24 min., og Steindor Hjaltalin gjørdist nummar trý við 41,05 min. Teir renna allir fyri Bragdið.

Bjørk Herup Olsen úr Bragdinum vann bólkin hjá kvinnum við tíðini 46,53 min.

Úrslitini vóru annars hesi.
Menn og veteranar, 10 km

| Nr. | Tíð | Navn | Árg. | Felag | Veteranar |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 34,36 | Jonhard Larsen | 1966 | Treysti | |
| 2 | 35,14 | Sigurð B. Justinussen | 1967 | Bragdið | |
| 3 | 36,34 | Sam Vang | 1970 | Bragdið | |
| 4 | 37,07 | Eyðtór J Joensen | 1967 | Bragdið | |
| 5 | 37,24 | Edgar Caballero | 1982 | Roysnið | |
| 6 | 37,25 | Trygvi Hansen | 1966 | Bragdið | |
| 7 | 37,40 | Jósvein Herup Olsen | 1958 | Bragdið | 1 |
| 8 | 38,33 | Eli J. Christiansen | 1985 | Tórshavn | |
| 9 | 38,38 | Sølvi R. Hansen | 1970 | Roysnið | |
| 10 | 38,51 | Dorian Petersen | 1968 | Bragdið | |
| 11 | 39,24 | Óli Olsen | 1949 | Bragdið | 2 |
| 12 | 39,44 | Suni Jacobsen | 1967 | Bragdið | |
| 13 | 41,05 | Steindor Hjaltalin | 1949 | Bragdið | 3 |
| 14 | 42,43 | Flemming Petersen | 1960 | Roysnið | |
| 15 | 43,09 | Ivan K. Christoffersen | 1973 | Tórshavn | |
| 16 | 44,59 | Jógvan J. Lorenzen | 1980 | Treysti | |
| 17 | 46,17 | Krisjan Christiansen | 1952 | Bragdið | 4 |
| 18 | 53,38 | Hans Birgir Hansen | 1949 | Bragdið | 5 |
| 19 | 58,43 | Óla Hans Olsen | 1956 | Bragdið | 6 |

**Kvinnur 10 km**

| Nr. | Tíð | Navn | Árg. | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 46,53 | Bjørk Herup Olsen | 1991 | Bragdið |






*Føroysku svimjararnir, sum um vikuskiftið tóku lut í stórari svimjikapping, komu heim við hópin av metum og heiðursmerkjum*

# Svimjitíðindi frá Køge Open 2004

**28 heiðursmerkir og 15nýggj met til føroysku svimjararnar**

SVIMJING
*tíðindaskriv*

Tað lá væl fyri hjá føroysku svimjararnum ið lutóku í stóru kappingini Køge Open um vikuskiftið. Tey komu heimaftur mánamorgunin við ikki færri enn 28 heiðursmerkjum, og 15 nýggjum bólka og føroyskum metum.

Svimjararnir ið luttóku úr Føoyum vóru í aldrinum 8 til 16 ár, so eingin av eldru svimjarnum vóru við.

Hetta er seytjanda árið at kappingin Køge Open er, og hevur hon ongantíð fyrr havt so nógvar luttakarar sum í ár. 600 svimjarar úr Danmark,Føroyum,Íslandi, Noregi og Svørikið løgdu rygg til teir 3600 startirnar ið vórðu svomnir yvir trýggjar dagar.

Flestu føroysku svimjararnir hava svomið sítt allarbesta, og hava tikið sekundir av bestu tíðum.

Eitt annað sum er sera positivt er at bólka og føroysk met ið hava staðið í fleiri ár, verða hølvaði av, so framtíðin í føroyskari svimjing sær bjørt út.

Eitt sensationelt vælaavrik hjá føroysku svimjararnum sum endaði við, at seks gull-, átta silvur- og 14 bronsumerki vórðu fingin til høldar.

Einstøku úrslitini, har talan antin var um met ella heiðursmerki, framganga av yvirlitinum niðanfyri

**Fríggjadagin 26 mars: Fyrsti dagur**

| **100 m blandað** | **Viðmerking** | **Tíð** |
|---|---|---|
| Pauli Ø. Mohr | Met í bólki 3 | 1.13.04 |
| Beinir E. Danielsen | Met í bólki 5 | 1.05.72 |
| Hanus Eysturdal | Met í bólki 4 | 1.08.40 |
| Elspa Mørkøre | Met í bólki 3, før. met og gull | 1.11.91 |
| Bjørg Seloy | Vann bronsu | 1.20.78 |
| Lisbeth L. Joensen | Met í bólki 5 | 1.12.14 |
| **200 m rygg** | | |
| Elspa Mørkøre | Met í bólki 3 | 2.33.67 |
| Kári J. á Høvdanum | Vann gull | 2.25.96 |
| Bjørg Seloy | Vann silvur | 2.49.61 |
| **400 m frí** | | |
| Jákup Øssursson | Vann | 4.27.05 |

**Leygardagur 27 mars: Næsti dagur: 100 m frí**

| | | |
|---|---|---|
| Elspa Mørkøre | Met í bólki 3 | 1.03.3 |
| Bjørg Seloy | Vann bronsu | 1.12.6 |
| **100 m rygg** | | |
| Elspa Mørkøre | Met í bólki 3 | 1.11.9 |
| Pauli Ø. Mohr | Met í bólki 3 | 1.12.1 |
| Bjørg Seloy | Vann Silvur | 1.22.1 |
| Kári J. á Høvdanum | Vann bronsu | 1.08.4 |
| **50 m firvald** | | |
| Bjørg Seloy | Vann gull | 0.34.2 |
| Beinir Danielsen | Vann silvur | 0.28.1 |
| **800 m frí** | | |
| Jákup Øssursson | Vann bronsu | 9.14.6 |
| **4X50 m blandað** | | |
| **Dreingir** | **Vunnu silvur** | 1.59.9 |
| Hanus Eysturdal | | |
| Per S. Hansen | | |
| Beinir Danielsen | | |
| Jákup Øssurson Mohr | | |
| Gentur | Vunnu gull | 2.17.1 |
| Hildibjørg Joensen | | |
| Eyðbjørg A. Petersen | | |
| Elspa Mørkøre | | |
| Heidi Strømsten | | |

**Sunnudagur 28 mars: Triðið dagur 50 m rygg**

| | | |
|---|---|---|
| Bjørg Seloy | Vann bronsu | 0.38.70 |
| Elspa Mørkøre | Met í bólki 3 og silvur | 0.33.36 |
| Kári J. á Høvdanum | Vann bronsu | 0.32.15 |
| **50 m frí** | | |
| Bjørg Seloy | Vann silvur | 0.32.49 |
| Elspa Mørkøre | Met í bólki 3 og bronsa | 0.29.27 |
| Pauli Ø. Mohr | Met í bólki 3 og bronsa | 0.28.27 |
| **100 m bringa** | | |
| Arnhold Davidsen | Vann silvur | 1.24.22 |
| Gunleif Olsen | Vann bronsu | 1.24.95 |
| Poula Ø. Mohr | Met í bólki 1 | 2.01.25 |
| **200 m bringa** | | |
| Arnhold Davidsen | Vann bronsu | 3.02.31 |
| **200 m blandað** | | |
| Bjørg Seloy | Vann gull | 2.57.36 |
| Elspa Mørkøre | Vann Bronsu | 2.36.37 |
| **100 m frí** | | |
| Poula Ø. Mohr | Met í bólki 1 | 1.31.26 |
| **200 m frí** | | |
| Bjørg Seloy | Vann bronsu | 2.37.95 |
| Pauli Ø. Mohr | Met í bólki 3 og silvur | 2.16.55 |
| **4x50 m frí** | | |
| **gentur** | **Met í bólki 2** | 2.31.4 |
| Hildur á Fløtti | | |
| Helena G. Jacobsen | | |
| Elisabeth Bærendsen | | |
| Dagmar Malena Winther | | |
| 4x50 m frí | | |
| gentur | Vunnu gull | 2.02.46 |
| Elspa Mørkøre | | |
| Kirstin Rasmussen | | |
| Heidi Strømsten | | |
| Hildibjørg Joensen | | |
| 4x50 m frí | | |
| dreingir | Vunnu bronsu | 1.48.58 |
| Beinir E. Danielsen | | |
| Hanus H. Eysturdal | | |
| Per S. Hansen | | |
| Jákup Øssursson | | |



# Telvað verður um FM-heitið

**Føroyameistaraskapurin, sum verður telvaður á Toftum í døgunum 3-10. apríl, hevur sera góða undirtøku við nærum methøgum luttakaratali. Meistarabólkurin tykist í ár rættiliga opin, men John Rødgaard, ið er hægst rataður, sleppur kortini ikki heilt undan favorittrolluni**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Føroysk telving blómar. 89 telvarar hava teknað seg til FM á páskum, harav 37 unglingar. Bert í fjør, tá FM varð í Havn, hava fleiri luttakarar roynt seg í føroyameistaraskapinum fyri einstaklingar.

Sjáldsamt at nærum 100 telvarar luttaka í kapping uttanfyri Havnina. Møguliga hava góðu virðislønirnar, ið fyrireikarnir bjóða vinnarunum, lokkað fleiri til Toftir. Hugurin og alskurin til talvið mann tó viga meir hjá allarflestu telvarunum, enn ein møgulig peningavirðisløn.



*Steintór Rasmussen vann FM-heitið í 1990. Hann hevur tó ikki tikið lut í FM-kappingini seinastu fýra ferðirnar, og tí er tað helst ein stór uppgáva, sum liggur fyri framman hjá honum*

**Eingin eyðsýntur favorittur**

Fimm telvarar í topp 10 eru á endaliga luttakaralistanum; IM John Rødgaard, Martin Poulsen, Olaf Berg, Carl Eli N. Samuelsen og Hans Kristian Simonsen. Einans 73 ratingstig skilja hesar fimm.

**Landsliðsbólkurin** IM

| | | |
|---|---|---|
| John Rødgaard | VT | 2274 |
| Martin Poulsen | HT | 2271 |
| Olaf Berg | HT | 2224 |
| Carl Eli Nolsøe Samuelsen | HT | 2223 |
| Hans Kristian Simonsen | KT | 2201 |
| Jens Kristian Hansen | TT | 2182 |
| Bogi Ziska | HT | 2147 |
| Rani Nolsøe | KTF | 2101 |
| Steintór Rasmussen | KTF | 2096 |
| Torkil Nielsen | ST | 2093 |

Og stutt er niður til næstu mennirnar, ið mynda hina helvtina av Landsliðsbólkinum. Sermerkt er, at einans Olaf og Carl Eli áður ikki hava verið føroyameistarar. Martin er verandi føroyameistari, og hinir sjey eiga allir eisini gylta heitið.

Rødgaard hevur rutinu sum fáur, og tapur sjáldan nakað talv. Martin, Olaf og Hans Kristian telva hinvegin allir meira kompromileyst, og eru tí oftari í vandasjógvi enn Rødgaard. Tó vinna teir kanska fleiri talv enn Rødgaard, og spennandi verður tí at vita hvør stílur í ár loysir seg best.

Martin hevur telvað nógv seinasta árið, og er helst í betri formi enn vit aðrir í hópinum.

**Steintór við aftur**

Teir fimm lægst rataðu í árliga Landsliðsbólkinum myndaðu absolutta toppin í føroyskari telving í 80´unum og fyrst í 90´unum. Møguliga telva teir ikki eins nógv nú sum fyri 10-20 árum síðani, men sanniliga kunnu teir vísa tenn. Eingin eigur at verða yvirraskaður, um ein ella tveir teirra fara at blanda seg í oddastríðið. T.d. høvdu Bogi Ziska og Torkil Nielsen eina góða liðkapping fyri feløg síni.

Jens Kristian Hansen telvar á heimabeiti, og Rani Nolsøe er íðin sum altíð og ræðist ongan.

Steintór Rasmussen hevur hinvegin einans telvað eitt talv í liðkappingini fyri Klaksvík seinastu tvey árini. Seinast hann luttók í FM, var í 1999. Føroyameistarin frá 1990 hevur tí eina stóra avbjóðing framman fyri sær. Fyri Steintór serliga, er ein góð byrjan uppá kappingina lykilin til eitt gott úrslit.

**Spennandi 1. bólkur**

Sjálvur meti eg, at talan er um tríggjar favorittar í 1. bólki; Finnbjørn Vang (2030), Eyðálvur Johannesen (1939) og Samson Højgaard (1904). Bólkurin er mannaður, eins og Landsliðsbólkurin, við 10 telvarum.

Umframt Landsliðsbólkin og 1. bólk, er ein opin almennur bólkur, ið 27 telvarar manna, ein Eldrabólkur (einans fyri telvarar yvir 50 ár) og Unglingabólkur.
Fylgið við á www.faroechess.com

# Ivasom byrjan hjá útisetum

**Føroyska fótbóltsfelagið í Keypmannahavn fekk eina heldur ivasama byrjan uppá kappingarárið í seriu 1**

FÓTBÓLTUR
*fotboltur.dk*

0-0 endaði ársins fyrsti dystur hjá besta liðnum hjá ÍF Føroyum. Mótstøðuliðið var Fremad Valby. Hóast ÍF Føroyar hevði heimavøll eydnaðist teimum ikki at seta seg á dystin, og tað var Fremad Valby, ið hevði teir flestu vandamiklu málmøguleikarnar. Sunvard Joensen í málinum hevði tí úr at gera við at halda málið reint, og tað eydnaðist eisini hjá tí vælleikandi gøtumanninum.

Hetta var samstundis fyrsti dysturin, sum ÍF Føroyar spældi á grasi. Allir venjingardystirnir og sjálv venjingin hava higartil verið á grasllíki, har føroysku leikararnir kenna seg meira heima. So tíðliga á árinum eru vallirnir ikki serliga góðir, og hetta darvaði spælinum hjá ÍF Føroyum meir enn Fremad Valby, sum dugdi betur at spæla eftir umstøðunum.




*Fyrrverandi landsliðsskiparin Jan Dam, sum nú býr í Keypmannahavn, taldist millum teir fyrstu 11 á liðnum hjá ÍF-Føroyum umvikuskifti*

**Byrjunaruppstilling:**

Sunnvard Joensen – Kristian Eli Andersen, Rógvi Joensen, Jan Dam (60. Janus Thomsen), Flóvin Þór Næs (55. Eyðstein Simonsen) – Jan Guttesen, Eyðun Højgaard, Petur Óli Samuelsen - Høgni Hansen (60. Jónleif Johannesen), Finn Mørk, Jørgin Meitilberg

Næsti dystur hjá ÍF Føroyum verður á heimavølli ímóti AIK Frederiksholm tann 8. apríl. Meira er at frætta á heimasíðuni www.fotboltur.dk.

# Blindtalvið hesa vikuna

Í hesum døgum verður ein vælmannað kapping leikt í Monte Carlo, har telvararnir fyrst telva eitt blindtalv móti hvørjum øðrum og síðani eitt kviktalv. Til bæði talvini hava telvararnir 25 min + 3 sek. pr. leik. Støðið á blindtalvunum er á hægsta stigi. Sí niðanfyri.

Ivanchuk,V (2716) - Svidler,P (2747)
Amber Blindfold Monte Carlo. 28.03.2004

1.d4 Rif6 2.c4 g6 3.f3 Bg7 4.e4 d6 5.Ric3 0—0 6.Bg5 a6 7.Rc1 Ribd7 8.b3 (Óvanligur leikur í kongaindisku byrjanini) 8...c6 9.Bd3 b5 10.Rige2 bxc4 11.Bxc4 d5 12.exd5 cxd5 13.Bd3 e5 14.0—0 Bb7 15.dxe5 Rixe5 16.Bb1 (b3 leikurin kemur til sín rætt nú. c4 punturin er vardur) 16...Re8 17.Fd2 Rc8 18.Rfd1 Fb6+ 19.Fd4 Fxd4+ 20.Rixd4 Ric6 21.Rice2 h6 22.Bh4 Rig4?

**Støðumynd**



Støðumynd eftir 22...Rig4

(Fyrsti veruligu feilur í blindtalvinum. Svidler "sá" helst ikki næsta leik) 23.Rxc6! Bxc6 24.fxg4 Bb5 25.Kf2 Bd7 26.h3 a5 27.Bd3 (Hvítur hevur vinnandi fyrimun, men í blindtalvi kann mangt henda) 27...a4 28.b4 a3 29.b5 Bf8 30.Kf3! (Djúpt!) 30...Bc5 31.Bf2 Rb8 32.Rc1 Rec8 33.Ric6! Bxc6 34.Rxc5 Bxb5 35.Rxc8+ Rxc8 36.Bxb5 Rc2 37.Ba4 Rxa2 38.Bd4 Rókurin sleppur ikki úr fangaleguni. Rd2 verður einfalt svarað við Ke3. 1—0